## Hevndin í München

Bert fá sekund vóru eftir av yvirtíðini, tá Ivica Olic í gjárkvøldið skoraði fyri Bayern München til 2-1 ímóti Manchester United, tá liðini hittust á Allianz Arena í Champions League-kappingini. Wayne Rooney, sum annars mátti skaddur út beint fyri dystarlok, hevði lagt United á odda 1-0 í øðrum minutti, og tá eitt korter var eftir, javnaði Franck Ribery fyri Bayern München, sum við sigursmálinum í evstu løtu fekk hevnt finaluósigurin fyri 11 árum síðani, tá United fekk tvey mál í yvirtíðini.




## Lyon er væl á veg

Hin fjórðingsfinalan í gjárkvøldið var ein rein fronsk uppgerð millum Lyon og Bordeaux, og har gjørdist Lyon drúgvara liðið og vann 3-1. Bordeaux-verjan var ikki góð, og bara 10 minuttir vóru farnir, tá Lisandro legði Lyon á odda. Chamakh javnaði bara fýra minuttir seinni, men fyri steðgin legði Michel Bastos vertirnar á odda 2-1. Hóast Bordeaux vildi meira í seinna hálvleiki, var tað Lyon, ið skoraði til endaliga úrslitið, 3-1, tá Lisandro aftur var á blettinum.

# Landskappingin í gongd

**Fyrsti dysturin í fyrsta landskappingarumfarinum í Vodafonedeildini verður spældur í Runavík kvøld millum NSÍ og ÍF. Hinir fýra dystirnir verða spældir í morgin**


einstein@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Leygardagin fór fótbólturin av álvara í gongd, tá fyrsta umfar var í kappingini um Løgmanssteypið, men nú byrjar so eisini tann langa landskappingin, ið ikki endar fyrr enn leygardagin 23. oktober, tá vit vita, hvør er føroyameistari og hvør sleppur út í Europa næsta ár, umframt hvør ikki sleppur at halda fram, men má niður í næstbestu deildina.

### NSÍ-ÍF

Fyrsti dysturin í fyrsta landskappingarumfarinum verður í Runavík í kvøld klokkan 18.30, tá NSÍ tekur ímóti ÍF. Í fjør endaði NSÍ á fjórða plássi og ÍF á sjeynda, og júst millum hesi feløgini eru fleiri skifti av spælarum farin fram undan hesum kappingarárinum.

### Víkingur-AB

Árið í fjør gjørdist enn eitt framstig hjá samanlagda felagnum í Gøtu og Leirvík, tí burturúr kom sigur í steypakappingini og bronsa í landskappingini. AB fekk hinvegin spælt seg úr vandanum fyri niðurflyting, tá liðið mitt í kappingini í fjør hevði fleiri góðar dystir og vann kærkomin stig.

### HB-FC Suðuroy

HB kann ikki vinna greipuna í ár, men framvegis er liðið favorittur at endurvinna meistaraheitið, eins og HB má metast sum favorittur ímóti uppflytarunum úr FC Suðuroy, sum enn ikki hava fingið alla oynna í sín part, men framvegis minna øgiliga nógv um gamla VB/Sumba.

### EB/Streymur-B36

Hóast talan er um fyrsta umfar, kundi dysturin við Margáir líkst einum toppdysti, tí bæði EB/Streymur og B36 verða roknað millum liðini heilt har frammi. EB/Streymur vann silvur í bæði lands- og steypakappingini í fjør, meðan B36 nú sær betur út, eftir at fjørárið var tað ringasta leingi.

### B68-B71

Á Toftum tekur B68 ímóti uppflytarunum úr B71, og heimaliðið er uttan iva favorittur ímóti sandoyingum, ið ikki møta við sterkastu uppstilling. B68 skal royna at betra sítt fimtapláss frá í fjør, meðan B71 eftir tvey ár í næstbestu deildini fyrst og fremst siktar eftir at stabilisera seg í tí bestu.



Í fjør var HB drúgvasta liðið í Vodafonedeildini og gjørdist føroyameistari. Í kvøld byrjar ein nýggj landskapping, sum heldur á líka til gott og væl hálvan oktober
Mynd: Álvur Haraldsen

## Komandi dystir

### Hondbóltur

**Fyrsta FM-finala, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 01/04 | 17.00 | Kyndil-Neistin | Rúni Mohr & Ragnar Simonsen |

**Onnur FM-finala, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 03/04 | 16.00 | Neistin-Kyndil | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |

**Møgulig triðja FM-finala, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 05/04 | | Neistin-Kyndil | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |

### Fótbóltur

**Vodafonedeildin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 31/03 | 18.30 | NSÍ-ÍF | Ransin Djurhuus |
| 01/04 | 15.00 | Víkingur-AB | Lars Müller |
| 01/04 | 15.00 | HB-FC Suðuroy | Dagfinn Olsen |
| 01/04 | 15.00 | EB/Streymur-B36 | Rúni Gaardbo |
| 01/04 | 15.00 | B68-B71 | Páll Augustinussen |
| 05/04 | 14.45 | FC Suðuroy-NSÍ | Rúni Gaardbo |
| 05/04 | 15.00 | Víkingur-HB | Eiler Rasmussen |
| 05/04 | 15.00 | B36-B68 | Ransin Djurhuus |
| 05/04 | 17.00 | AB-B71 | Dagfinn Olsen |
| 06/04 | 18.00 | ÍF-EB/Streymur | Petur Reinert |

**1. deild, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 01/04 | | KÍ-MB | Janus Petersen |
| 01/04 | | AB-EB/Streymur | Pætur Albinus |
| 01/04 | | Víkingur-Skála | Elsa Andreasen |
| 05/04 | | KÍ-AB | Elsa Andreasen |
| 05/04 | | EB/Streymur-Víkingur | Dia Lamhauge |
| 05/04 | | MB-Skála | Birgir Joensen |

**1. deild, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 03/04 | 15.00 | HB-EB/Streymur | Rói Jacobsen |
| 03/04 | 17.00 | KÍ-FC Hoyvík | Petur Reinert |
| 03/04 | 15.00 | TB-AB | Lars Müller |
| 03/04 | 17.00 | 07 Vestur-NSÍ | Bent Tommy Linklett |
| 03/04 | 15.00 | Víkingur-B68 | Johan Petur Michelsen |

## Fýra lið til tvey pláss

Av teimum 10 liðunum í 1. deild hjá monnum, eru tað bara fýra, ið kunnu flyta upp, meðan restin eru eykamanningarnar hjá Vodafonefeløgunum. Tí skulu TB, KÍ, 07 Vestur og FC Hoyvík kappast um tvey uppflytingarpláss í landskappingini hjá teimum næstbestu, sum byrjar páskaftan, 3. apríl.

HB, sum í fjør var oddalið leingi, tekur ímóti øðrum uppflytaraliðnum, EB/Streymi, meðan TB spælir ímóti hinum uppflytaranum, AB. KÍ og FC Hoyvík hittast í fyrstu uppgerðini millum tvey av teimum, ið kunnu flyta upp, og síðani eru hinir báðir dystirnir 07 Vestur-NSÍ og Víkingur-B68.

hil

## KÍ-kvinnurnar aftur favorittar

Landskappingin í 1. deild hjá kvinnum fer av bakkastokki í morgin, og lítið man vera at ivast í, at KÍ, sum hevur vunnið FM síðstu 10 árini, enn eina ferð er favorittur. Og skal nakar bjóða teimum av, bendir alt á, at tað aftur í ár verða steypa- og silvurvinnararnir frá í fjør, AB.

Í fyrsta umfarinum tekur KÍ ímóti uppflytarunum úr MB, AB spælir heima ímóti EB/Streymi, og bronsuvinnarin í fjør, Víkingur, tekur ímóti Skála.

hil